

[www.oljan.fo](www.oljan.fo)

**Jan Müller** 19 - 03 - 2013

# Sverdrup-fundið uppaftur størri enn hildið

Tað vísir seg nú, at tað risastóra Johan Sverduup-fundið toyggir seg inn í eitt annan loyvi í Norðsjónum og er sostatt uppaftur størri enn higartil hildið. Hetta er staðfest, nú Statoil hevur borað ein avmarkingarbrunn saman við samstarvsfeløgunum Petoro og Det norske Oljeselskap. Bottom of Form 1 - Úrslitið av boringini verður tikið við í menningina av Johan Sverdrup-leiðini. Nøgdin verður tikin við í ta samlaðu metingina fyri Johan Sverdrup, sigur Øivind Reinertsen, sum stendur fyri útbyggingini á Johan Sverdrup-leiðini vegna Statoil. Gro Haatvedt, sum er leitistjóri hjá Statoil á norskum øki, sigur, at seinni í ár fer felagið at bora ein leitibrunn í Cliffhanger-prospektinum, og tá verður ætlandi gjørligt at staðfesta ta endaligu nøgdina í Johan Sverdrup-leiðini.